# Frederiksberg er úti

**Tað eydnaðist ikki føroysku flogbólts-útisetunum at spæla seg í semi-finaluni í DM**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var væntandi, at Frederiksberg Volley fór at fáa tað trupult í seinasta dystinum móti DHG, sum liggur á odda í kappingini. Úrslitið gjørdist eisini eitt greitt 3-0 tap, og hetta merkir so, at tað ikki eydnaðist Frederiksberg at tryggja sær atgongd til hálvfinaluna.

Føroysku genturnar halda tað sjálvandi vera spell, at tær ikki rukku hesum máli, men hinvegin halda tær, at liðið hevur ment seg sera nógv, og at tað tí ikki er nógv annað at gera at dríva á við venjingini til komandi ár.

Sum skilst, verður manningin á liðnum á leið hin sama sum í fjør, og so er bert at vóna, at framgongdin, sum tær hava sýnt í ár, stendur við. Annars senda tær tríggjar einar eina heilsu heim, og ikki minst til Atlantic Airways, sum hevur stuðlað teimum hetta kappingarárið.

# Óli fer í gongd

**Óli Johannesen skal sunnukvøldið spæla fyrsta dystin fyri nýggja felag sítt**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Meðan Todi Jónsson, Jákup Mikkelsen og hinir í superliguni halda frí hetta vikuskiftið, fer næstbesta danska deildini í gongd við at avgreiða seinnu kappingarhálvu.

Fyri Óla Johannesen merkir hetta samstundis, at hann fyri fyrstu ferð skal royna seg í veruligum dysti fyri nýggja felag sítt, Hvidovre.

Møguleikararnir fyri eini góðari byrjani tykjast so avgjørt at vera til staðar, tí mótstøðuliðið er Birkerød, sum bert hevur fingið sjey stig í teimum 15 dystunum, sum higartil eru leiktir hetta kappingarárið.

Hvidovre er í løtuni á 11. plássi við 17 stigum.

# Petur verður aftur hjá Kyndli

**Petur Magnusson, sum í fjør vardi Neistamálið, er nú aftur í Føroyum, har hann fer at standa í mál hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrra árið taldist hann millum kyndilsleikararnar, sum at kalla høvdu gullmerkini um hálsin, men sum kortini sóu tey gleppa sær av hondum, og í fjør taldist hann so millum teirra, sum tryggjaðu Neistanum gull fyri fyrstu ferð í 22 ár.

Petur Magnusson hevur síðani búleikast í Íslandi, men nú hevur hann so gjørt av, at flyta aftur til Føroya, og tað verður Kyndil, sum fer at fáa ágóðan av leikaranum hesaferð.

Sophus Dal Christiansen, venjari hjá Kyndli, sigur við Sosialin, at tað enn ikki endaliga avgreitt, hvørt Petyur verður við, tá Kyndil skal spæla móti KÍF um vikuskifitð. Sum skilst, er alt ikki endaliga avgreitt við spæliloyvi, men kyndilsvenjarin sigur, at hetta bert eru formalitetir, og at alt skuldi verið komið í rættlag heilt skjótt.

Annars hevur Kyndil eisini fingið tilgongd av einum grønlendskum leikara, sum skal búleikast í Føroyum komandi árið.

# So kann VÍF avgera



*Kvinnurnar hjá VÍF kunnu gerast føroyameistarar um vikuskiftið, um úrslitini annars laga seg eftir vild*

**Um VB fær stig við sær úr Klaksvík, kunnu kvinnurnar hjá VÍF tryggjað sær FM-heitið sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum kunnugt, so kiksaði tað hjá besta mansliðinum hjá VÍF at ogna sær meistaraheitið, tá teir mikukvøldið spældu á Skála.

Um vikuskiftið hava somu VÍF-menn frí, men hetta nýtist ikki at merkja, at eingin hondbóltur verður í bygdini.

Kvinnuliðið hjá VÍF, sum alt árið hevur ligið í oddinum, hevur nevnliga møguleikan at staðfesta einaveldi sítt, tá tær sunnudagin spæla heimadyst móti VB. Seinast liðini hittust, gav VB dygga mótstøðu fyrstu løtuna, men at enda var talan at kalla um eina styrkisuppvísing frá VÍF.

Tað er ikki víst, at talan verður um ein somiki sannførandi sigur aftur hesaferð, men hinvegin er ilt at ímynda sær, at VÍF ikki fer at vinna dystin sunnudagin, og skuldi tað kiksað, so skal tó nógv henda afturat, um tað ikki skal eydnast teimum at ogna sær gullmerkini.

Sum sagt, so er treytin fyri gullmerkjum til VÍF, at VB megnar at gera okkurt við Stjørnuna, tá hesi bæði liðni hittast í Klaksvík. Um sæð verður burtur frá dystunum í Coca-Cola kappingini, har VB var greitt omaná, so hevur talan higartil verið um sera javnar dystir millum báðar silvurbiðlarnar, og eingin orsøk er til, at tað ikki skuldi verið so leygardagin.

Liðini hóska í spælistíli væl til hvørt annað, og so at siga hvørja ferð tey hava hitst seinastu tvey árini, hevur talan verið um sera spenanni og undirhaldandi dystir.

Seinasti dysturin í kvinnudeildini um vikuskiftið verður á Giljanesi, har Kyndil fer á vitjan hjá Sóljuni. Sóljan tykist longu hava mist møguleikan fyri at varveita sessin í deildini, og tískil er væntandi, at Kyndil fer at taka stigini heim. Hinvegin er hetta helst besti møguleikin hjá Sóljuni, um tær kortini skulu bjarga sær, so einki er at ivast í, at tær veruliga fara at spenna seg út.

## Silvurdysturin

Hjá monnunum er spurningurin um gullið enn ikki avgreiddur, men einki er at ivast í, at tað verða vestmenningar, sum taka sær av hesum.

Um silvurmerkini er dysturin tó harður, og tey bæði liðini, sum eru fremst í hesum stríðnum, skulu bæði royna seg um vikuskiftið.

Á Skála fær StÍF vitjan av H71, og hetta átti alt annað líka at verið ein avgreiðsluspurningur hjá heimaliðnum, sum rættiliga tykist hava fingið gongd aftur á spælið.

Uppgávan hjá Kyndli tykist nakað torførari, tá teir skulu til Vestmanna at dystast móti kollfirðingum. KÍF hevur givið Kyndli stórar trupulleikar í fleiri dystum, men skulu teir grønu hava møguleika fyri silvurinum, eru avgjørt ikki ráð til fleiri mistøk.

**Støðan 1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 8 | 8 - 0 - 0 | 606 | 321 | 285 | 28 |
| 2 | Stjørnan | 7 | 5 - 0 - 2 | 521 | 398 | 123 | 20 |
| 3 | VB | 7 | 5 - 0 - 2 | 508 | 389 | 119 | 19 |
| 4 | Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 414 | 404 | 10 | 15 |
| 5 | Kyndil | 7 | 1 - 1 - 5 | 442 | 536 | -94 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 8 | 1 - 1 - 6 | 307 | 512 | -205 | 4 |
| 7 | Sóljan | 8 | 0 - 0 - 8 | 318 | 556 | -238 | 2 |

**Støðan 1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 8 | 7 - 0 - 1 | 644 | 482 | 162 | 26 |
| 2 | StÍF | 8 | 5 - 1 - 2 | 577 | 517 | 60 | 19 |
| 3 | Kyndil | 7 | 4 - 1 - 2 | 534 | 483 | 51 | 17 |
| 4 | Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 491 | 499 | -8 | 16 |
| 5 | KÍF | 7 | 3 - 1 - 3 | 457 | 505 | -48 | 10 |
| 6 | H71 | 8 | 1 - 0 - 7 | 508 | 580 | -72 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 8 | 0 - 1 - 7 | 458 | 603 | -145 | 4 |




Søkt verður eftir
**tveimum lærarum til maskindeild skúlans**

**Maskindeildin:**
Størvini eru fulltíðarstørv, sum umfata undirvísing í maskinsmíð við tilhoyrandi ástøðisligum fakum.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum maskinsmiður og minst 2 ára starvsroyndir í hesum yrki, á maskinverkstaði ella líknandi arbeiðsplássi eftir lokna lærutíð. Fyrimunur er at hava víðari útbúgving sum maskinmeistari, verkfrøðingur ella aðra viðkomandi útbúgving, men er tó eingin treyt.
Eisini er áhugi fyri CAD/CAM og CNC ein fyrimunur.

Royndartíðin er 2 ár.

Tey, sum sett verða, mugu vera til reiðar at taka lut í pedagogiskum útbúgvingarskeiðum eins og øðrum neyðugum eftirútbúgvingarskeiðum innan fakið.

Starvið verður sett 1. apríl til at byrja beinanvegin.

Lønin verður smb. sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlan á tlf. 311957.

Umsóknin til starvið skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2001. Við umsóknini skal fylgja avrit av próvskjølum og møguligar starvsváttanir. Umsóknin skal merkjast »lærarar til maskindeildina«.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239
FO-110 Tórshavn

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**

Søkt verður eftir verkstaðarassistenti til Smiðju- og hárfríðkanardeildir skúlans.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum maskinsmiðir, smiðir ella elektrikari við minst 5 ára starvsroyndum. EDV kunnleiki á brúkarastøði er ein fyrimunur, eins og víðari útbúgving er ein fyrimunur.

Arbeiðið umfatar:
- Umvæling av amboðum og útbúnaði á báðum deildunum
- Innkeyp av tilfari til smiðjudeildina
- Umsita amboð og tilfarsgoymsluna á smiðjudeildini
- Verða lærarum til hjálpar í samb. við undirvísing á smiðjuverkstaðnum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Handverkarafelag.

Skrivlig umsókn merkt »verkstaðarassistentur« skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2001.

Starvið verður sett 1. apríl 2001, ella skjótast gjørligt.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239
FO-110 Tórshavn
Teldupostur: tst@tst.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

**Verkfrøðingur**

Søkt verður eftir verkfrøðingi til byggideildina hjá stovninum.
Byggideildin hevur ábyrgdina av almennum byggi- og anlegsarbeiðum frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn, og virkar sum byggiharraráðgevi í øllum lutum. Deildin er nýstovnað, og tann, ið verður settur, verður við til at byggja hana upp frá byrjan.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um eitt nú samskifti við stýrir, ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar, útbjóðing, sáttmálar við ráðgevarar og arbeiðstakarar, prosjektgransking, byggileiðslu, tíðarstýring, fíggjarstýring, skrásetting, byggiroknskap o.a.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir royndum byggiverkfrøðingi. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum geva fyrimun, men er eingin treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2001. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til byggideildina». Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 31 13 33
(e-postur: kristian@lv.fo).

Søkt verður eftir
**Íbúð ella sethúsum til leigu**

Í sambandi við setan av jarðfrøðingi leitar Jarðfrøðisavnið eftir hóskandi íbúð ella sethúsum til leigu til eitt danskt par við tveimum børnum í Tórshavn ella aðrastaðni í miðstaðarøkinum. Hugsað verður einamest um langtíðarleigu, men alt hevur áhuga.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Jarðfrøðisavnið**
Brekkutún 1, Hoyvík
Postsmoga 3169
110 Tórshavn
tel. 357000
t-post: jfs@jfs.fo

Vaskivognar Kantinuvognar





Vit hava nógv ymisk snið av vaski- og kantinuvognum á goymslu. Vitja framsýningarhølið okkara ella ring og fá eitt prát við okkum. Vit senda sjálvandi katalog um alt landi.

P/F Thomas Dam á Hálsi
Heykavegur 3 Tlf. 311400

**Muskelterapeut**

Hevur tú:
√ Høvuðpínu
√ Læsta øksl
√ Músa-arm
√ Knýttar vøddar o.a.
√ Ynski um økta vælveru

( Viðgerðartilboðið kann eisini fáast sum gávukort )

**Hervør Jacobsen**
Læknaexam.Muskelterapeut
**Tlf. 213034**
eftir kl. 16.00 vanl. gerandisdagar, tó ikki hósdag.

Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg